**BILSTEREO!**
Nýtt av merkinum Blaupunkt til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 321225/211232*

## Ymiskt

**NOKIA TLF. TIL SØLU**
Tvær Nokia mobiltelefonir til sølu. Ein lítið brúkt Nokia 5210 og ein heilt nýggj Nokia 3310 til sølu fyri 500,- kr stk. Ladari fylgir við báðum telefonunum.
*Tlf. 32861312 ella 26394786*
*mail: uniklas@hotmail.*

**ER TAÐ NAKAR**
sum skal hava flytigóðs til Føroyar úr Danmark? Eg havi nakað av plássi.
*Tel: 0045 61306166*

**SPILDURNÝGGJ NOKIA 6820**
við kamera, spøl, kalendara, GPRS-MMS til sølu fyri 1.800 kr. Nýprísur 3.187,-
*Tlf. 315856/224678*

**VIÐFESTISVOGNAR**
Tredal vognar, við spiral fjaðrum til sølu. Ein er á goymslu. Kunnu síggjast á heimasíðu www.tredal.no
*Tlf. 218101 Todal-Velbastað*

**VINDEYGU TIL SØLU**
9 træ-vindeygu 120 x 120 til sølu.
*Tlf. 421002/721002*

**TERMORÚTAR**
2 1002x1002 mm, 1 1002x1202 mm. til sølu.
*Tlf. 580783*

**NOKIA 6600**
Eg havi eina lítið brúkta Nokia 6600 fartelefon til sølu. Telefonin kann spæla MP3 og hevur alt í ynskjast kann. Eisini havi eg eina Nokia 7250i til sølu.
*Ring og hoyr nærri 268412*

**GARASJUHURÐ**
brúkt, 212 x 248 til sølu fyri kr. 1.000,-
*Tlf. 441586*

**KUNOYINGAR BURTURI OG HEIMA**
Skipað verður fyri hugnaløtu við røstum kjøti og súpan í bygdarhúsinum í Kunoy kl. 15.30 Andrassmessudag 11. desember. Tekning fer fram á tlf. 267473 ella 727272 áðrenn 4. desember.
*Bygdarfelagið Vesturskin*

**GRUNDØKI Í VÁGI**
til sølu. Liggur væl fyri í Høgabø við góðum útsýni. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 220819*

**TRAPPA TIL SØLU**
Trappuhol ca. 1,90 x 196, breidd 102, hædd ca.216, høgra niður.
*Telefon 517526*

**DIGITAL CAMERA**
Digital-camera med større memory-kort. God julegave. 2,3 Pixel. Gode skarpe billeder. Software PC medfølger. Kr. 600,- Nypris 2600,- kr. Sælges grundet gave. Alt i fin stand.
*Tlf. 222842*

**KOPIMASKINA TIL SØLU**
Farvu Laser, Xerox 5790. Kopimaskinan kann eisini brúkast sum prentari. Prentar allar støddir upptil A3. Prentar við Laser og eisini í farvum. Hevur eisini møguleikan at prenta á t-shirts, koppar, músamáttur osv. Printservari til maskinuna fylgir við. 2 sett av tónarum, svørtum og farvum fylgja við.
*Ring 509696 og hoyr nærri*

**EIN LÍTIÐ BRÚKT**
Nokia N-Gage telefon til sølu fyri 1500 kr. + 2 spøl. Ring ella sms á
*tlf. 581078*

**TIL SØLU**
Ein wc-kumma, IFÖ, hvít.
*Tlf. 503249*

**LUMMATELDA**
N-Gagefartelefon. Við hesari fartelefonin kanst tú m.a. spæla spøl, avpspæla og taka upp MP3 fílar, hoyra útvarp, recorda og spæla tráðleyst. Eisini er innbygdur hátalari. Selist fyri einans kr. 1100 við onkrum spæli!
*Ring 317376*

**BÍLIGUR FERÐASEÐIL**
Einvegis flogferðaseðil frá Keypmannahavn til Føroyar tann 29.12.2004 til sølu. Kostnaður bert 1000,- kr.
*Tlf. 346514*

**TIL SØLU**
Træ persiennur, kirsuber, til sølu. 2 stk L x B: 210 x 120 cm. 1 stk L X B: 110 x 113 cm. Allar fyri 500,- kr
*Tlf. 332982 ella 266070*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Málningur av Frits Johannesen er til sølu. Ring og hoyri meiri.
*Tlf. 422174*

**CONTAINARI TIL SØLU**
20 fót containari, isoleraður, álklædning uttan og innan. Upplýsningar á
*tlf. 458011/758011*

**LOPPUMARKNAÐUR – REYÐI KROSSUR FØROYA**
Loppumarknaður verður leygardagin 4. desember kl. 10.00-14.30 í Vágsbotni 9. Vit vóna, at síggja nógv fólk.Tikið verður ímóti smálutum mikudagin 1. desember kl. 19-21.
*Reyði Krossur Føroya*

**ÚTHURÐ YNSKIST**
Ein úthurð við karmi vanlig stødd: ca. 2 m h.- b. 89 cm og trý vindeygu b.100 cm og h. 50 cm, úr plast ella timbur ynskjast til keyps.
*Tlf. 263893*

**FARTELEFON**
Siemens C60 við litskermi, Triple Band og polyphoniskar ringitónar. Prísur 500,-
*Tlf. 219280*

**TIL SØLU**
Nakrir jólaplattar til sølu.
*Tlf. 224052*

**NOKIA 3200 TIL SØLU**
hevur allar hentleikar t.d. camera, radio, polyfon. ringitónar, ladari og headsett eru við. Prísuppskot 1.000,- kr.
*Tlf. 504368*

**EG VILDI FEGIN**
Eg vildi fegin komi í samband við tann sum mánadagin 21-11 hevur koyrt, helst bakka inn í hurðina á mínum bili einum reyðum Citroen Saxo, bilurin stóð parkeraður uttanfyri missiónshúsið, millum kl 12:30 og 14:30 meðan eg var til jarðarferð.
*Janus tlf. 312773*

**TIL ØLL, SUM TRENA VØDDARNAR**
Nýtt protein- og kreatinpulvur. Sera gott, serliga til vøddauppbygging.
*Ringið 282870*

**DIGITALT MYNDATÓL**
5MP digitalt myndatól Minolta Dimage 7hi + Blitz Sigma EF-500 DG Super + 256MB Memory Kort + battarí upplátari + taska til sølu fyri 5.500 kr. Nýprísur: 17.000 kr. Myndatóli er 1,5 ára gamalt. Hygg á www.msirko.com/dimage7hi fyri at síggja myndatóli og fleiri myndir, sum eru tiknar við hesum myndatóli.
*Tlf. 503510, 317322*

**TIL SØLU**
Ein brúkt garasjuhurð úr timbri, í góðum standi, stødd 210x260 karmmál. Fyri ein sámuligan prís.
*Tlf. 514363 millum kl. 17-18*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG**
Jólaveitslan verður leygardagin 11. des. kl. 17. í bygdarhúsinum í Hósvík. Bussarnir koyra sum vanligt. Til ber at tekna seg hjá onkrum í nevndini í seinasta lagi 5.des. kostnaður 120 kr. Minnist til jólapakka.
*Nevndin*

**GULDHALSKÆDE**
til mand, 14 krt. elegant ankerkæde, 50 cm. Vægt 50,9 gr. sælges for 3000,00
*Tlf. 271827*

# VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 11*

nakra heildarmynd av óhappinum 15. januar 2004?

## Gev kundanum tað, ið kundin vil hava

Ein aðalregla innan sølu og marknaðarføring er, at ein skal altíð geva kundanum tað, ið kundin vil hava. Ja, helst skal ein geva kundanum *meira*, enn kundin vil hava.

Hvør er "kundin" hjá Skipaeftirlitinum í Norrønumálinum? Er tað Smyril Line? Er tað tryggingarfelagið hjá Norrønu? Er tað skipari og manning? Er tað ákæruvaldið? Er tað dómsvaldið? Eru tað ferðafólkini, sum vóru við á túrinum? Eru tað onnur ferðafólk, ið kanska ætla sær ein túr við Norrønu í framtíðini? Er tað almennu Føroyar? Er tað sjóvinnufelags-skapurin IMO?

Rætta svarið er almennu Føroyar og sjóvinnufelagsskapurin IMO. Men lesur ein frágreiðingina, fer ein longu tíðliga at ivast í, *hvørt tað er, ið Skipaeftirlitið heldur, at "kundin" er*. Hinvegin er tað kanska ikki so løgið, tí Skipaeftirlitið hevur minst fýra kasjettar á høvdinum í hesum máli og veit ikki sjálvt *nær* tað hevur henda ella handa kasjettin. Kanska Skipaeftirlitið hugsar sum so, at tað hevur *ongan týdning*, tí teir **eiga** allar fýra?

Skipaeftirlitið skal helst eisini kunnu samskifta við øll reiðarí í Føroyum og aðrastaðni við, sum ætla sær at byggja ella keypa skip, og skráseta tey undir føroyskum flaggi. Skipaeftirlitið skal jú góðkenna hesi skip og geva teimum siglingarloyvi. Gev kundanum tað, ið kundin vil hava ... og helst eitt sindur afturat.

## Avleiðingar av Norrønufrágreiðingini frá Skipaeftirlitinum

Hvørjar avleiðingar fær Norrønufrágreiðingin frá Skipaeftirlitinum?

- **Smyril Line** hevur við stjóranum, Óla Hammer, á odda, longu alment boðað frá, at frágreiðingin fær ongar avleiðingar fyri mannagongdir og skjøl, sum eru umborð á Norrønu. Alt fer at vera, sum tað higartil hevur verið.
- **Tórshavnar havn** hevur eisini boðað frá, at teir ikki ætla sær at broyta nakrar mannagongdir á havnarskrivstovuni. Alt skal vera, sum tað higartil hevur verið.
- **Skipaeftirlitið** fær ein løgfrøðing afturat sær at rokna frá 1. januar, so - sum aðalstjórin í Fiskimálaráðnum tók til í útvarpinum - **Skipaeftirlitið ikki endurtekur somu mistøkini**, sum teir hava gjørt í Norrønumálinum.
- **Skiparin** á túrinum 15. januar 2004, Ólavur Hovsgarð, fekk 30. november handað eina skrivliga uppsøgn frá Smyril Line undirskrivaða av Óla Hammer, Jóannes á Váli og Klæmint Weihe, tí leiðslan á Smyril Line er komið til ta niðurstøðu, at teir - **við støði í Norrønufrágreiðingini frá Skipaeftirlitinum** - ikki meta tað vera **rætt**, at Ólavur Hovsgarð heldur áfram sum skipari við Norrønu.

Hevur "kundin" nú fingið tað, sum "kundin" vildi hava?

## Gjørd gerð fær onga vend

Eftir stendur, at gjørd gerð fær onga vend. Norrøna var veruliga fyri einum óhappið 15. januar 2004, Ólavur Hovsgarð var veruliga skipari á túrinum og Skipaeftirlitið hevur veruliga gjørt eina frágreiðing um óhappið og almannakunngjørt frágreiðingina við staðfestingum og niðurstøðum, sum eru bygdar á eitt ófullkomið upplýsingargrundarlag, skeivleikar, illgitingar og onnur grunnleggjandi mistøk, ið ein *kanningarmyndugleiki* ikki eigur at gera.

Spurningurin er, um sjuskverkið fær nakrar avleiðingar fyri **Skipaeftirlitið?** Fær sjuskverkið nakrar avleiðingar fyri teir **persónar**, sum hava skrivað sjuskverkið? Fær sjuskverkið nakrar avleiðingar fyri tey fólk í fyrisitingarliga bygnaðinum, sum vóru varskógvað um feilir og veikleikar í frágreiðingini frá Skipaeftirlitinum? Ella skulu vit øll bara venda hina síðuna til og verða á so føroysk og siga at farið er farið?

Um sjuskverkið frá Skipaeftirlitinum ongar avleiðingar fær fyri teir persónar, sum hava latið hetta vánaverk úr hondum, so prógvar tað, at onki mark er fyri, hvat letur seg gera í lítlu Føroyum. Tað er ein skomm fyri almennu Føroyar, men størst er skommin hjá Skipaeftirlitinum.

## Niðurstøður og tilmæli

Sambært kanningarsetninginum í grein 13 í lógini um trygd á sjónum, so skal ein kanningar-myndugleiki kanna *orsøkina til*, *at ein vanlukka er hend*. Um óhappið við Norrønu hin 15. januar skal flokkast sum ein *vanlukka* ella sum eitt *óhapp* er ein "definitiónsspurningur". Skipaeftirlitið hevur so í øllum førum valt at kalla tað eitt óhapp. Kanska *vanlukku-heitið* bara skal brúkast, tá fólkaskaði er hendur, skipið sokkið, ella havumhvørvi verður dálkað í so stóran mun, at djóra- og plantulív eru í vanda ella oyðiløgd. Undir øllum umstøðum eigur onki ivamál at vera um, *nær* Skipaeftirlitið av røttum eigur at brúka tíð og kreftir uppá at kanna eina *vanlukku* og nær Skipaeftirlitið skal brúka tíð og kreftir uppá at kanna eitt *óhapp*.

Hinvegin er tað eins umráðandi, at føroyska fyrisitingin skipar seg á ein hátt, sum egnar seg til okkara viðurskifti. At hava eitt tilfeldigt fakumhvørvi í Skipaeftirlitinum, sum skal taka sær av øllum skipaspurningum, er ein hóttan móti rættartrygdini í hesum landi.

**Mælt verður til, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum beinanvegin - sum avleiðing av Norrønumálinum - tekur neyðug stig at bøta um veikleikarnar í verandi bygnaði og verandi skipan.**

**Mælt verður eisini landsstýrismanninum í fiskivinnumálum til - sum avleiðing av Norrønumálinum - at taka neyðug stig at rætta teir feilir og skeivleikar, sum kunnu staðfestast í frá-greiðingini frá Skipaeftirlitinum um óhappið á Norrønu 15. januar 2004.**

Aðalstjórin í Fiskimálaráðnum hevur alment verið frammi í útvarpinum og staðfest, at útlendsk serfrøði veruliga hevur verið brúkt í Norrønumálinum. Til tað havi eg hesar spurningar:

1) Eftir hvørjum arbeiðssetningini arbeiddi persónurin úr donsku "Opklaringsenheden"?
2) Fekk persónurin til uppgávu at blástemplað arbeiðið hjá Skipaeftirlitinum?
3) Fekk persónurin til uppgávu at kanna óhappið við Norrønu 15. januar 2004?
4) Fekk persónurin høvi at eftirkanna alt tilfarið í málinum? Eisini tað føroyska tilfarið? Eru allar partsviðmerkingarnar umsettar til danskt? Hvør hevur umsett tær?

Alt okkara fólk, sum hevur sítt dagliga yrki á sjónum, hevur krav uppá at fáa vissu fyri, at førleiki og góðskaræður um trygd á sjónum. Tað er teirra lív og heilsa, sum stendur uppá spæl.

## Eftirskrift

At enda vil undirritaða takka øllum teimum, sum vælmeint hava ávara meg um, at tað kann fáa avleiðingar fyri mín persón, at eg soleiðis alment leggi meg út í at lýsa og seta spurningar við eitt (sjusk)verk, sum ein almennur myndugleiki hevur latið úr hondum, sipandi til, at eg eri starvsett í einum øðrum almennum myndugleika. Til tað, havi eg hesar viðmerkingar:

Eisini alment sett starvsfólk hava talufrælsi í hesum landi. Ongar reglur eru, sum avmarkað mítt talufrælsi, uttan tá talan er um upplýsingar, sum eru fevndar av mínari tagnarskyldu í sambandi við mítt almenna starv. Eg eri ikki farin alment út í illoyalitetið ímóti mínum egna arbeiðsgevara.

Eg eri farin alment út við mínum atfinningum, tí eg sum løgfrøðingur við fleiri ára royndum innan almenna fyrisiting ikki kann góðtaka, at eitt slíkt sjuskverk verður almannakunngjørt uttan at nakar rópar varskó. Tað er mín vón, at almenna viðgerðin ikki hevur verið til fánýtis og at onkur, *onkur við myndugleika og við áræði og áhuga fyri trygd á sjónum*, tekur málið upp, so bøtt kann verða um støðuna til æru fyri okkara sjófólk, sum eg ynski eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýttár, við vón um, at tey ikki verða fyri vanlukkum og óhappum á sjónum.